Grækarismessudag varð í Vágsbotni í Tórshavn avdúkaður minnisvarðin, sum myndahøggarin Hans Pauli Olsen hevur gjørt yvir Nólsoyar-Páll. Í trimum greinum í Sosialinum gevur Hans Jacob Debes, professari, dr.phil., eina lýsing av manninum og samtíð hansara.

NÓLSOYAR-PÁLL

– maðurin og samtíðin

2. partur

Rætturin

Tað, sum hesin gestarættur við fimm limum (sorinskrivara og fýra løgrættumonnum úr Havn) skuldi taka støðu til, var, um Nólsoyar-Páll hevði brotið søttverjureglurnar, um tað var satt, at hann á viðum havi hevði selt einum svenskum skipara ta vøru, sum hann hevði sagt seg ætla at fara við til Kristiansand, og um hann ólógliga hevði flutt vøru til Føroya. Nólsoyar-Páll vardi seg við, at hann hevði eingi ørindi havt í Havn, at eingin vandi var fyri smittu við skipi hansara; hann hevði báðar váttanirnar og kundi havt sýnt kommandantinum tær, sum hann eisini gjørdi seinni. Mørck, handilsforvaltari, trúði ikki, at vøran var seld nøkrum svenskum skipara; hann trúði heldur, at Royndin Fríða hevði havt vøruna við sær til Føroya og lagt hana upp í Suðuroy. Hann hevði sent Havnar sýslumann við øðrum til Suðuroyar at kanna eftir, um hetta var so. Hjá Peri í Gjørðum og Jákup í Toftum hevði hann funnið nakrar jarngrýtur, nakað av lørifti, turriklæðum, siroppi og brennivíni. Har í oynni segði eingin seg vita nakað um ólógligan handil og uppskiping; men handilsforvaltarin helt vørurnar vera krógvaðar. Jákup í Toftum varð tikin við norður til Havnar. Kommandanturin og forvaltarin tóku seg tá burtur úr ákærustarvinum, sum varð latið Jógvani Kristianssyni upp í hendur. Av rættarfundunum skilst, at tað yvirhøvur varð hildið, at Løbner og




Nólsoyar-Páll

sýslumaðurin gjørdu nógv við loynihandil sjálvir, og Løbner tók ákæruna móti Nólsoyar-Pálli fyri ólógligan handil burtur úr skuldsetingunum. Undir eiði vitnaði manningin, at tað var satt, at vøran var skipað umborð í tað svenska skipið, og at tað sindrið, sum eftir var, var lagt upp í Suðuroy og í Norðuroyum. Ákærin segði ikki samsvar vera millum tollseðilin, sum skiparin syndi fram, og vørurnar, hann hevði havt við til Føroya. Hartil vísti hann á, at skjalið, sum skuldi prógva søluna til tað svenska skipið, var ógvuliga ótullfiggjað; har stóð einki um, hvørjar vørurnar vóru og einki um nøgd, hvørki navn ella staðseting, og hann helt hvørki undirskrift ella innsigling vera sannførandi. Sýslumaðurin kravdi, at hald varð lagt á vørurnar, tí talan var um brot á 1790-fyriskipanina.

Nólsoyar-Páll segði alt sakarmálið koma av persónligum hatri til sín, tí at hann hevði roynt og vilja at hjálpa landsmonnum sínum fram. Hann segði seg einki at hava flutt út ella inn, sum var ólógligt. Aftur í móti legði hann beinleiðis allar triggjar ákærarnar, kommandantin, forvaltaran og sýslumannin undir at hava vitað um loyniligan handil leingi og einki gjørt til tess at forða honum; tvørturímóti vóru teir allir uppi í sjálvir. Hann segði seg sostatt vera ósekan og helt seg hava rætt til endurgjald, serliga, tí at sakarmálið hevði tarnað honum í fiskiskapinum.

Dómur

Tann 26. august gjørdi gestarætturin úrskurð. Nólsoyar-Páll varð dømdur sekur í at hava brotið søttverjureglurnar. Viðvíkjandi handlinum við tann svenska skiparan varð dømt, at ólógligt var at handla á viðum havi; fyri tað varð hann dømdur at gjalda í bót 735 ríkisdálar, uttan so at hann alt fyri




Løbner

eitt stevndi handilsforvaltaranum og læt hann høyra eið upp á, at hesin handil veruliga var farin fram, sum vitnað. Fyri loynihandil í Føroyum varð hann fríkendur við hesum orðum: »Hvad øvrigt her i landet kan være forefundet, som indført af skipper Nolsøe ved denne hans rejse, da ansaa retten det ikke af større betydenhed, end hvad enhver i almindelighed fører og har ført for sig ella til tjeneste for en anden, og derfor uden bróde«.

Eiðsvørjing

Tann 1. oktober svór Nólsoyar-Páll í rættinum, at frágreiðingin um søluna til hin svenska skiparan var sonn. Harvið var hetta sakarmálið av; men nú vildi Nólsoyar-Páll hava hevnd. Hann ætlaði at fáa loynihandil embætismanna fram í ljósið. Hann vildi hava ein eykarætt at kanna eftir, um loynihandil var farin fram í Havn í fleiri ár. Løbner gjørdi alt, hann kundi, at forða fyri hesum; men Nólsoyar-Páll vendi sær til stiftsamtmannin yvir Sælandi, sum Føroyar hoyrdu undir, og hann gjørdi av, at málið skuldi takast til viðgerðar. Harvið byrjaði eitt nýtt og drúgt sakarmál. Nólsoyar-Páll fekk menn at játta, at teir høvdu keypt brennivín og tubbak frá Jógvani Kristianssyni fyri troyggjur og stevndi honum síðan fyri rættin, sum varð settur 25. februar 1807. Fleiri vitni vóru biðin um at koma á rættarfundin at svara 13 spurmingum, sum Nólsoyar-Páll hevði sett upp. Sýslumaðurin segði seg ikki hava flutt inn aðrar vørur enn tær, sum hann hevði loyvi til sum »bestillingsgods«, t.e. sovorðið, sum ein í smáum nøgdum kundi flyta inn til egna nýtslu móti at rinda farmagjald og eitt lítið avgjald; hetta vóru vørur, sum ikki vóru á takstlistanum; hann legði eisini Jákup Nolsøe, sum viðhvørt møtti í rættinum fyri bróðurin, undir at hava selt tubbak eins og hann sjálvur. Vitnini bóru seg øll undan. Tey søgdu seg bert *hava hoyrt*, at loynihandil fór fram, og at sýslumaðurin skuldi selja vørur, sum hann hevði fingið við handilsskipunum. Bert eitt vitni viðgekk at hava keypt eitt tubbaksrull frá sýslumanninum. Nólsoyar-Páll kravdi eftir avhoyringina



Byrjan og endi á skjalinum, sum Nólsoyar-Páll legði fram í rættinum í 1806